# Økisterapeutur

## til Heimarøktina í Suðuroy

Almanna og heilsumálaráðið hevur avgjørt at seta á stovn økisterapi í øllum landinum. Í hesum sambandi er ætlanin at seta ein økisterapeut í Suðuroy frá 1. desember ella skjótast gjørligt.

Økisterapeuturin skal veita tænastu til fólk við tørvi á uppvenjing og viðlíkahaldi av førleika. Tænastan verður veitt til vaksin yvir 18 ár, ið búgva heima ella á eldrasambýlum kring landið.

Økisterapi er eitt nýtt tilboð, ið skal skipast og mennast í tøttum samstarvi við økisleiðslurnar, aðrar samstarvsfelagar og starvsfólkabólkar, ið hava týdning fyri hin einstaka brúkaran.

Økisterapeuturin hevur ábyrgd mótvegis økisleiðaranum.

**Í mun til tann einstaka brúkaran skal økisterapeuturin:**
- meta um førleika og tørv á tiltøkum
- veita ADL- og funktiónsvenjing
- veita vegleiðing til starvsfólk og avvarðandi í at vera um brúkaran
- veita ergonomiska vegleiðing, undirvísing og ráðgeving til starvsfólk og avvarandi
- gera uppfylgjandi arbeiði í samband við útskrivan frá sjúkrahúsi
- viðvirka við meting, útvegan og nýtslu av hjálpartólum, húsabroytingum v.m.

**Vit sóknast eftir einum ergo-og/ella fysioterapeuti, sum:**
- hevur arbeiðsroyndir
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at samskifta við brúkarar og avvarðandi
- hevur hug og hegni at arbeiða tvørfakligt og samstarva við aðrar stovnar.

**Vit bjóða:**
- eitt nýtt starv við møguleika fyri at skipa og menna starvsinnihaldið
- eitt mennandi umhvørvi við møguleika fyri førleikamenning.

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Økisterapeuturin verður løntur sambart sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag við einaískoyti.

Setanarøkið er Heimarøktin. Tænastustaðurin er í løtuni Suðuroyar Øki.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Mary í Garði stjóra fyri Heimarøktina og Serforsorgina, á tlf. 304020 ella Jeannu í Lágabø, økisleiðara á tlf. 373907.

Umsókn við neyðugum prógvum og viðmælum skal sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
att: Mary J. í Garði, stjóra
Eirargarður 2, 2 hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 4 november

# Eg eri 21 ár og vil fegin arbeiða

- Havi arbeitt í mathandli síðan eg var 17 ár.
- Havi arbeitt í køkinum og gjørt reint á Sjómannsheimi í Grønlandi í 3 mðr. sum avloysari í vetur.
- Havi passað børn, bæði stór og smá.
- Havi verið 3 mðr. á bíbilskúla í Sveits, hjá "Evangelisk Børnemission." (Tað var á enskum)
- Eg fekk studentarprógv í 2004.
- Eg eri álítandi og kann møta tíðliga á morgni.
- Eg dugi at samstarva við onnur og at arbeiða sjálvstøvugt.

Barnaansing og húsarhald hevur eisini áhuga.
Tað kann gott verða minni enn 40 tímar um vikuna.

Eg búgvi í Klaksvík og eiti Elin Østerø.
**Ring til 277213 ella 423032**

i Sosialurin

# Umlættingar-familja

Barnaverndarnevndin í Klaksvík søkir eftir umlættingarfamilju til 11 ára gamlan drong tvey vikuskifti um mánaðan.

Endamálið hjá umlættingarfamiljuni er at stuðla dronginum á øllum økjum og at geva honum góðar upplivingar.

Arbeiðið verður skipað í samráð við barnaverndarnevndina í Klaksvík.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru sambart galdandi reglum.

Áhugaðar familjur kunnu fáa nærri upplýsingar við at venda sær til Súsonnu Gaard sosialráðgeva á tlf: 410000.

Umsóknir skulu sendast til

**Barnaverndarnevndina**
Klaksvíkar Kommuna
Postboks 2, FO-700 Klaksvík

# Eykaaðalfundur

Eykaaðalfundur verður leygardagin 5. november 2005 kl. 10.00 í hølum felagsins í Tjarnardeild 7.

Fundarskrá: Broyting av Felagslívstryggingini

Aftaná eykaaðalfundin verður kjakfundur.

**Føroya Arbeiðarafelag**

## Tit ringja - vit syngja!






## Kom til kalda borðið í Losjuni í Gøtu

**Nú leygarkvøldið 22. oktober kl. 20, verður bygdakvøld í losjuni. borðreitt verður við tí kalda borðinum og góðum undirhaldi við 3. stuttligasta manni í Føroyum, Magna Poulsen og Alva Justinussen, og felagssangi.**



**Atgongumerkir kunnu bíleggjast hjá Arndis Joensen, fartel 22 40 73.**

**Avmarkað atgongd.
Øll eru vælkomin!**

**Aftaná spæla "Tvey av Kamarinum" til dans**

**LOSJAN Í GØTU**

# Hondlesing í Tórshavn í november

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein annarleiðis máti at síggja teg sjálvan.

Vinarliga ring og bið um tíð á
**tlf. 0045 39664880 ella 0045 3116 8053**

veitst tú ikki tað?